# Nøvn

## Føðingar



*Fríggjadagin 4. februar fingu Ragnhild Petursdóttir Kjærbo, Kambsdali, og Pætur á Líknargøtu, Saltangará, ein son. Hann vigaði 3430 gr. og var 55 cm. langur.*

*Her situr Petur Henry undir lítlabeiggja sínum.*

27. januar fingu Maria Wiberg og Heimur Kristiansen, Frederikssberg, eina dóttur. Hon var 55 cm long og vigaði 3700 gr.

8. februar fingu Guðri og Pól Andrias Larsen, Toftum, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 4310 gr.

8. februar fingu Rannvá Matras og Jens Jón Olsen, Vestmanna, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3780 gr.

9. februar fingu Sólfríð Christiansen og Rógvi Rasmussen, Skála, ein son. Hann var 56 cm langur og vigaði 4275 gr.

9. februar fingu Rannvá Thomsen og Knút Vesturtún, Kambsdali, eina dóttur. Hon var 56 cm long og vigaði 4650 gr.

10. februar fingu Helena og Saviour Mifsud, Tórshavn, ein son. Hann var 49 cm langur og vigaði 2900 gr.

10. februar fingu Berit og Heri Silvurdal, Vági, tvíburðar, gentu og drong. Dótturin var 49 cm long og vigaði 2680 gr. Sonurin var 51 cm langur og vigaði 2830 gr.

14. februar fingu Vígdis Bjarnadóttir og Ívar Bærentsen, Nólsoy, eina dóttur. Hon var 50 cm long og vigaði 2600 gr.

14. februar fingu Sara og Christian Christiansen, Tórshavn, ein son. Hann var 58 cm langur og vigaði 3900 gr.

14. februar fingu Jona Johansen og Leivur Langaard, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3700 gr.

15. februar fingu Elin Svínoy Hansen og Johnny Festirstein Hansen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 50 cm long og vigaði 3090 gr.

16. februar fingu Unnur Didriksen Lassen og Rógvi Lassen, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 55 cm long og vigaði 3915 gr.

16. februar fingu Nancy Djurhuus, Leirvík, og Hans Krosstein, Klaksvík, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3340 gr.

17. februar fingu Charlotta S. Venned og Tummas Simonsen, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 55 cm long og vigaði 4375 gr.



## *Tí størstur er kærleikin*

BRYNHILD Í JÁKUPSSTOVU
IN MEMORIAM

*Vit, Sjúrður Gullbein og synir, fara vegna familjurnar at takka øllum tykkum, sum hava hjálpt so væl, nú okkara elskaða mamma og kona gjørdist sjúk og mátti fara av foldum.*

*Tað er svárt at koma í slíka støðu. Har alt húskið í einum fellur í av-djúpt myrkur, har einans glúpskar og óunniligar kenslur finnast.*

*Men soleiðis var bara, um tit ikki vóru har. Tí í sama andartaki, vit fóru út av eggini, rættust ótaldar hendur eftir okkum inni í myrkrinum og vildu reisa okkum aftur.*

*Tað hevur eydnast tykkum, og tað takka vit tykkum fyri.*

*Vit takka eisini fyri tann hjarta-nemandi kærleika, tit góvu Brynhild hennara seinastu dagar.*

*Tykkum, sum stuðlaðu so væl við hjálp, bøn og vitskapi. Sjúkrasystrum, læknum, kirkju, skyldfólki og vinum. Tí eins stór og sorgin er innilig gleðin við ta hjálp, tit hava givið.*

*Ein okkara mátti einsamøll fara frá okkum.*

*Tað er Brynhild.*

*Ein edilig kona, ein elskandi mamma, ein glað omma, ein trúgv dóttir og syst-ir, ein virðilig verdóttir og svigarinna, ein klókur og raskur starvsfelagi og ein góð vinkona hevur sagt farvæl fyri seinastu ferð.*

*Tað er svárt hjá okkum, sum elskaðu Brynhild og vóru góð við hana. Men tó at hon er farin, so lótu tit hana kenna, hvussu veldugur kærleikin er. Tit vermdu hjarta hennara.*

*Latið tí kærleikan – saman við minnunum um Brynhild í Jákupsstovu – búgva í bróstum tykkara.*

*Tí størstur er kærleikin.*
*Størstur av øllum.*

*Vegna familjurnar,*
*Sjúrður og synir.*





Altíð tað nýggjasta

www.sosialurin.fo